# Kjak



Jógvan við Keldu
*fyrrverandi landsstýrismaður*

## Tá róð verður aftur á

*Nú løggevandi valdið í hesum døgum ger sær dælt av hendingum um rættferð og reinleika, nøkur teirra serliga vælleikandi sum sita í andstøðu, kundi verið hóskandi at víst á onkur brot, sum fóru fram í árunum 2004 og 2005*

Tað var nú ikki bara Annita á Fríðriksmørk, sum fór um mark, men so mong onnur, sum kann viðgerast eina aðru ferð

Av og á var meiri enn gjálvut men eisini spennandi og mennandi, tó haldi eg tað vera syrgiligt, at embætisfólk í ráðnum frá tingsins røðarapalli vóru so niðrandi viðfarin, og mong vóru tey løgtingsfólk, sum høvdu hug at seta seg yvir lógir og reglar.

Fari í fyrstu syftu bara at taka eitt dømi, tað er brot úr grein í hesum árum frá løgtingsliminum Annitu á Fríðriksmørk, sum ídag er formaður í tinbólkinum hjá Tjóðveldi, undir yvirskriftini: »Í Tinganesi má Jógvan við Keldu ikki fáa longt sítt arbeiðs- og uppihaldsloyvi«.

### Jógvan aftur í egnum skóm

Hon tekur m.a. soleiðis til í greinini: »Er landsstýrið undir umsiting: Herfyri var landsstýrismaðurin tikin í forhoyr hjá umboðum fyri hinar flokkarnar í samgongu. Evnið var útlendingapolitikkur samgongunnar. Á fundinum fekk landsstýrismaðurin at vita, at so leingi nýggj avtala ikki var gjørd, skuldi hann halda seg til førda útlendingapolitikkin, sum var galdandi áðrenn sitandi samgonga tók við. (Altso samgongan sum Annita á Fríðriksmørk sat í. Red.) Landsstýrismaðurin var solleiðis settur undir umsiting«.

Víðari sigur hon: »Tá hugsaði eg við mær sjávlum: »Gud viti, hvussu leingi ein landsstýrismaður kann føra ein politikk, sum hinir í samgonguni vilja hava, men sum ein sjálvur er ímóti, men sum hann kortini hevur evstu ábyrgd av«. Og nú í vikuni síggja vit so landsstýrismannin í útlendingamálum í sínum egnum skóm aftur, og uttan himpr blakar konu og dóttir av landinum, sum hava verið her í seks ár«.

### Handfaringin broytt og ruddað varð upp

Bæði tingkvinnan og tingfólk annars kendu og vitstu, hvat »førdi útlendinga-politikkurin« í samgonguni, har tingkvinnan frammanundan var í, hevði ført til. Útlendingar, sum vóru ólógliga í landinum, vóru komin í syrgiliga støðu og búðu hjálparleys í ráðum og køldum byngjum, ávís ítróttamál handfarin ólógliga, sum best bar til og t.d. fútin vitsti ikki hvat hann skuldi »stilla upp« í hesum lógloysinum, bara fyri at nevna okkurt dømi. Tí var neyðugt at seta lið av fólki, sum saman við fólki úr Innlendismálaráðnum, kundu gjøgnumganga fyrrverandi skilaleysu og tilvildarligu handfaringina. Hetta vitsti okkara høga løgting, tað var ikki tí, tey leikaðu so í.

- Hesa handfaring var tað tingkvinnan aftur ynskti endurtikna.

Tað fer altíð at verða torført ella vónleyst at stýra, tá løggevandi valdið setur seg yvir - og ikki respekterar - lógir og reglar, tí kann vera hent - av og á - at rógva aftur á, so møguleiki kann verða at læra av søguni!

Sigrid Vesturgarð

## Eitt hjartasuff til tey, ið varða av 3 - 2 í Kringvarpinum

Nú tann fyrsta kappingin í FM fyri lið, innan Amboðsfimleik, eftir summarsteðgin er farin aftur um bak, eri eg ótrúliga vónbrotin um, at SVF ikki so mikið gjørdi sær tann ómakin, nú SVF hóast alt vóru í FIMI og gjørdi eitt »innslag«.

At SVF hvørki gjørdu sær tann ómakin at nevna hvørji feløg luttóku, eiheldur at nevna hvussu kappingin hevði hilnast, haldi eg vera átaluvert, og ótrúligani harmuligt, tí hetta skriv.

Kappingin fevndi hóast alt um tveir dagar, við uml. 100 íðkarum!

Eg haldi tað vera sera harmuligt, og eri ótrúligani vónbrotin, tí at fimleikurin, og ikki minst íðkarinir, leiðarnir og feløgini, leggja so nógva orku í, alt fyri fimleikinum at fræma.

Kappingarnar innan filmleikin eru ikki so nógvar, í mun til aðrar ítróttargreinar, tí kundu tær gott havt størri »pláss« í sendingini, tá tær eru.

Til hvørja kapping gera allir Íðkarar, venjarar, stuðlar og fimleikasambandið sítt fyri, at alt skal ganga upp í eina hægri eind.

Tey hava annað uppiborðið.

***Við Ítróttakvøðu***

Lesið Sosialin -so eru tit við!


JÓLASØLA
Á VERKHÚSINUM STÍGGJUR
LEYGARDAGIN 27. NOV. FRÁ 10-17

ADVOKATSKRIVSTOVAN

TVINGSILS-SØLU

**Týsdagin tann 14. desember 2010, kl. 11.15**, verður á Dómaraskrivstovuni í rættarsali IV, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir matr. nr. 145 s, Kollafjørður. Ognin er eini sethús í tveimum hæddum til støddar uml. 110 m2 hvør hæddin. Grundøkið er uppá 729 m2.
Húsini eru partvíst betong og partvíst klødd við timbri. Húsini hava flatt tak við Derbygum.
Húsini eru innrættaði soleiðis:
**Kjallarahæddin:**
Uml. 114 m2 til støddar: Inngongd við trappu til ovaru hæddina, tvey kømur, eitt hálvliðugt baðirúm og eitt rátt kjallararúm.
**Ovara hæddin:**
Uml. 108 m2 til støddar: Køkur og stova í einum, tvey kømur, WC og bað.
Húsini eru óliðug bæði innan og uttan.
Sølan er umbiðin av **Óla Jákupi Kristoffersen, advokati, Frúutrøð 4, Tórshavn, tlf. 35 33 35, e-mail ojk@jura.fo** (j. nr. 2010069 2), ið kann geva nærri upplýsingar og útflýggja tvingsilssøluuppstilling, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

FØROYA FÚTARÆTTUR

Frúutrøð 4 · Postboks 6
FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36
www.jura.fo